Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022, verður § 20 orðað soleiðis:

"**§ 20.** Næmingatalið í hvørjum flokki eigur við skúlaársbyrjan ikki at vera hægri enn 22. Hetta verður galdandi frá skúlaárinum 2025-26, tá byrjað verður við 1. flokki og síðani endaliga sett í gildi eftir níggju árum.
Stk. 2. Er næmingatalið í einum flokki hægri enn 22, kann skúlaleiðarin í ávísum førum avgera ikki at býta flokkin í tveir flokkar."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2025.

Samtykt á Løgtingi hin 21. mai 2024 við 31-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 23. mai 2024

stjóri